Fylgiskjal 35

Tórshavn, 17.01.20

Almannamálaráðið

**Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð**

Almannamálaráðið hevur sent Umhvørvis- og vinumálaráðnum uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin) til ummælis. UVMR hevur viðmerkingar til ásetingarnar í uppskotinum, sum hava við uppihaldsveiting til útlendingar at gera.

UVMR skal gera vart við, at útlendingaøkið ikki er yvirtikið sum málsøki. Tað er danska Udlændinge- og integrationsministeriet, sum varar av útlendingalóggávuni, og er tað Udlændingestyrelsen og Styrelsen for International Rekruttering og Integrantion í Danmark, sum eru myndugleikar á økinum í Føroyum.

Sambært málsøkjabýtinum varar landsstýrismaðurin í Umhvørvis- og vinnumálum landsstýrisins vegna av útlendingaøkinum í viðurskiftunum við ríkismyndugleikarnar. Útlendingastovan hevur, landsstýrisins vegna, til uppgávu at geva donskum myndugleikum eitt ummæli í málum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi og málum um familjusamanføring.

Víst verður tí á týdningin av, at møguligir spurningar um samspælið millum ásetingarnar í uppskotinum til vælferðarlóg og ásetingar í útlendingalóggávuni eisini verða lagdir fyri røttu donsku myndugleikarnir.

Ítøkiliga hevur UVMR viðmerkingar til ásetingarnar í § 7, stk. 1 og 2 í uppskotinum, sum snúgva seg um rættindini hjá útlendingum til uppihaldsveiting. Eisini hevur UVMR viðmerkingar til almennu og serligu viðmerkingarnar í uppskotinum.

***Viðmerkingar til ásetingarnar í § 7, stk. 1 og 2:***

Ásetingarnar í § 7, stk. 1 og 2 í uppskotinum eru soljóðandi:

*§ 7. Bert persónur við donskum heimarætti, ella persónur, ið hevur rætt til ikki tíðaravmarkað uppihaldsloyvi, hevur rætt til longurvarandi uppihaldsveiting sambært hesi løgtingslóg. Tað sama er galdandi fyri persón, ið er fevndur av sáttmála við onnur lond.*

*Stk. 2. Hevur útlendingur, ið ikki er fevndur av stk. 1, tørv á longurvarandi uppihaldsveiting, kann Útlendingastýrið, eftir áheitan frá Almannaverkinum, gera av at senda persónin heim.*

UVMR skal vísa á, at tað ikki er vanligt at brúka orðingina “ikki tíðaravmarkað uppihaldsloyvi”. Mælt verður til heldur at brúka orðingina “varandi uppihaldsloyvi”.

UVMR skal vísa á, at tá talan er um útlending við tíðaravmarkaðum uppihaldsloyvi, og hetta er grundað á arbeiðsloyvi, er SIRI (Styrelsen for International Rekruttering og Integration) rætti myndugleiki. Tá talan er um útlending við tíðaravmarkaðum uppihaldsloyvi, og hetta er grundað á familjusamanføring, er tað Udlændingestyrelsen, sum er rætti myndugleiki. Mælt verður tí til, at tað í § 7, stk. 2 verður nýtt annað heiti enn *Útlendingastýrið*. Mett verður, at tað er betri, um orðið *útlendingamyndugleikin* ella *útlendingamyndugleikarnir* verður nýtt.

***Viðmerkingar til almennu viðmerkingarnar:***

Á s. 38 í almennu viðmerkingunum í uppskotinum stendur:

*Tá uppskotið varð sent til hoyringar, vóru ongar ásetingar um samanspælið millum uppihaldsveiting og at senda útlendingar av landinum. Hesar reglur eru nú í lógaruppskotinum og eru tilevnaðar saman við Uttanríkis – og Mentamálaráðnum ( áður Uttanríkis- og vinnumálaráðnum) og danska Uttanríkismálaráðnum.*

Røttu myndugleikarnir eru *Umhvørvis- og vinnumálaráðið* og *danska Udlændinge- og integrationsministeriet*, og tí verður mælt til hetta verður rættað í tekstinum.

***Viðmerkingar til serligu viðmerkingarnar:***

Í serligu viðmerkingunum til § 7 á s. 77 í uppskotinum stendur:

*Tað, sum er avgerandi fyri rættin til longurvarandi uppihaldsveiting, er, at persónurin hevur rætt til ikki tíðaravmarkað uppihaldsloyvi. Ikki tíðaravmarkaða uppihaldsloyvið noyðist sostatt ikki at vera avgreitt fyri, at persónurin kann fáa longurvarandi uppihaldsveiting.*

UVMR ivast í, hvussu hetta skal skiljast, og metir tað vera viðkomandi at spyrja, hvussu Almannaverkið kann vita, um ein persónur hevur rætt til varandi uppihaldsloyvi, og tí rætt til longurvarandi uppihaldsveiting, tá eingin avgerð er tikin í málinum um varandi uppihaldsloyvi. Mett verður, at tað kann vera trupult hjá einum øðrum myndugleika enn útlendingamyndugleikunum at meta um, hvørt viðkomandi hevur rætt til eitt varandi uppihaldsloyvi ella ikki. Tað kunnu vera nógv viðurskifti, sum gera, at ein útlendingur ikki fær varandi uppihaldsloyvi í Føroyum. Eitt nú kann sum dømi verða nevnt, at viðkomandi hevur verið nógv burturstaddur úr Føroyum, og tí hevur nógv "glopp" í lønarútgjaldingunum. Omanfyri nevndi tekstur kann tykjast ógreiður, og mælt verður til, at tað verður nágreinað, hvussu ætlanin er at umsita hetta fyri tey, sum hava tørv á eini longurvarandi uppihaldsveiting, men enn ikki hava fingið eitt varandi uppihaldsloyvi.

Í serligu viðmerkingunum til § 7 á s. 77 í uppskotinum stendur:

*Persónur, ið hevur havt fyribils arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum í 7 ár, hevur sambært útlendingalóggávuni rætt til at fáa ikki tíðaravmarkað arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Tað sama er galdandi fyri persón, ið hevur havt uppihaldsloyvi við atliti at familjusameining í 3 ár.*

UVMR skal vísa á, at tað ikki er heilt rætt, tá tað stendur, at persónur, sum hevur havt tíðaravmarkað arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum í 7 ár, *sambært útlendingalóggávuni* hevur rætt til varandi uppihaldsloyvi. Áramálið á 7 ár er ikki staðiliga ásett í útlendingalóggávuni, men er talan um eitt áramál, sum í praksis verður brúkt í sambandi við umsóknir um varandi uppihaldsloyvi.

Krøvini um eitt áramál við tíðaravmarkaðum uppihaldsloyvi fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi eru ikki tey einastu, ið ein persónur skal lúka. Onnur krøv, ið skulu vera lokin fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum, eru eitt nú, at persónurin ikki hevur gjørt nakað revsivert og onga skuld hevur til tað almenna. Persónur, sum hevur havt eitt tíðaravmarkað arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum í 7 ár, skal, áðrenn viðkomandi kann fáa eitt varandi loyvi, eisini luttaka í einari integratiónssamrøðu, har viðkomandi prógvar at hava ávísan førleika í føroyskum máli.

Mælt verður tí til, at tað í viðmerkingunum verður skoytt uppí verandi tekst "*.....um nærri treytir annars eru loknar*". Á tann hátt gongur tað fram, at eisini onnur krøv, umframt áramálið við tíðaravmarkaðum uppihaldsloyvi, eru galdandi fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum.

Vinarliga

Anna Borg Dahl

ráðgevi